## UTTAN ÚR HEIMI

## Ósemja um oljuvinnu norðanfyri

Í næsta mánað fara norsku myndugleikarnir fyri 18. ferð at bjóða oljufeløgunum øki at leita á.

Í seinastuni hevur verið gitt, um myndugleikarnir fara at taka Barentshavið við í hetta útbjóðingarumfarið. Einar Steensnæs, oljumálaráðharri, hevur sagt, at hann tekur undir við at taka tær norðaru havleiðirnar við, men tað er minni enn so vist, at hann fær sín vilja. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra hevur gjørt púra greitt, at hann tekur ikki undir við, at oljufeløgini sleppa at bora á leiðum, sum eru so týðandi fiskileiðir, sum Barentshavið er. Norsku umhvørvisverndarfelagsskapirnir taka av heilum huga undir við Kristiliga Fólkaflokkinum.

Arbeiðaraflokkurin og Høgriflokkurin taka haraftur-ímóti undir við oljumálaráðharranum, og norskir fjølmiðlar siga, at avgerðin hjá Arbeiðaraflokkinum at bjarga fíggjarlógini hjá stjórnini fyri næsta ár kann bera í sær, at stjórnin noyðist at laga seg eftir tí stóra andstøðuflokkinum í oljumálinum.

## Gjaldoyragøla í Wall Street

Amerikanska samveldisløgreglan FBI hevur handtikið 48 fólk, sum eru skuldsett fyri at hava svikað við útlendskum gjaldoyra. Amerikanskir fjølmiðlar siga, at svikið snýr seg um fleiri milliónir dollarar.

Ein talsmaður hjá FBI sigur við Reuters, at minst tíggju av teimum tiknu hava arbeitt við at keypa og selja virðisbrøv. Teir arbeiddu í Two World Financial Center í Wall Street, til teir vórðu tiknir týsdagin. Teir tíggju vóru allir í hondjørnum og gjørdu alt fyri at fjala andlitið, tá løgreglumenninir komu út við teimum.

Sambært sjónvarpinum NBC høvdu virðisbrævahandilsmenninir lumpað íleggjarar við at billa teimum inn, at teirra pengar vórðu settir í fremmand gjaldoyra, og at hetta fór at kasta nógv av sær. Men sambært FBI kundu hesir íleggjararnir als ikki luttaka í slíkum handli, og tað vistu virðisbrævahandilsmenninir væl.

## Vil sleppa út

John Hinckley Jr., sum royndi at beina fyri fyrrverandi amerikanska forsetanum Ronald Reagan í 1981, hevur nú biðið um at sleppa av sinnissjúkrahúsinum, sum hann hevur verið á seinastu 21 árini.

Reagan, talsmaður hansara James Brady og ein tænastumaður hjá Secret Service vórðu særdir, tá John Hinckley Jr. lat fleiri skot av eftir teimum. Hann varð alt fyri eitt tikin, og í 1982 gjørdi eitt nevningating av, at hann var sinnissjúkur. Síðani hevur maðurin verið á sinnissjúkrahúsinum St. Elizabeth's Hospital í høvuðsstaðnum Washington, men nú vil hann sleppa út haðani, so hann kann vitja foreldrini, uttan at nakar eftirlitsmaður er við honum.

Seinastu árini er John Hinckley Jr. fleiri ferðir sloppin út av sjúkrahúsinum, men bert undir strongum eftirliti. Ákæruvaldið er ímóti, at hann sleppur út uttan eftirlit, men verjar hansara halda, at myndugleikarnir eiga at sleppa eftirlitinum, tí maðurin er ikki nøkur hóttan ímóti samfelagnum longur, siga teir.

## Alt greitt hjá Røkke

Viðurskiftini ímillum norska ríkmannin Kjell Inge Røkke og teir, sum eiga pengar til góðar hjá honum, eru nú komin í rættlag, skriva norsk bløð.

Tann seinasta forðingin var franska frálandavinnufyritøkan Technip-Coflexip. Fyritøkan átti 70 milliónir krónur hjá Røkke, sum hon skuldi hava í september, og sum hon nú hevur fingið. Herfyri eydnaðist Røkke at fáa eina avtalu við norska felagið Orkla, sum eigur 600 milliónir krónur til góðar hjá Røkke. Eftir avtaluni skuldi felagið hava 150 milliónir krónur nú, og pengarnar hevur felagið nú fingið.

Kjell Inge Røkke hevur verið rættiliga kroystur í seinastuni, og fyri stuttum noyddist hann at selja privata flogfar sítt fyri at rinda skuld. Stjórin í Røkke-felagnum Aker RGI, Leif-Arne Langøy, sigur við Aftenposten, at nú eru øll viðurskiftini komin í rættlag.

# Nógvir krígsbrotsmenn fjala seg í Noregi

**Norsku myndugleikarnir kanna í løtuni viðurskiftini hjá fýra útlendingum, sum eru undir illgruna fyri at hava framt krígsbrotsverk. Men tað rætta talið er kanska fleiri hundrað**

KRÍGSBROTSVERK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgmálaráðið í Oslo hevur sett statsadvokatin Arne Willy Dahl at kanna viðurskiftini hjá teimum, sum eru undir illgruna fyri at hava framr krígsbrotsverk, áðrenn tey so eru komin til Noregs at fjala seg. Hann skal samstundis manna eitt serligt løgreglulið, sum skal fara til arbeiðis í februar næsta ár.

Statsadvokaturin er ikki í iva um, at har er nógv at kanna, og sjálvur sigur hann við Aftenposten, at tað ivaleyst eru fleiri hundrað útlendingar í Noregi, sum eru sekir í krígsbrotsverkum aðrastaðni.

Í fyrsta umfari er ætlanin at kanna fólk, sum eru komin til Noregs úr londunum í gamla Jugoslavia, serliga úr Bosnia og Kosovo, men ætlanin er eisini at kanna viðurskiftini hjá teimum, sum eru komin úr afrikanska landinum Rwanda, og sum kunnu hava verið uppi í fólkamorðinum har frá 1991 til 1995.

Uttanríkisráðið í Oslo hevur upplýsingar um útlendingarnar, sum eru í Noregi, og statsadvokaturin skal nú kanna tey. Men tað er ikki løtuverk, tí talan er um skjøl, sum viðvíkja fleiri túsund útlendingum, skrivar Aftenposten. Sambært Arne Willy Dahl er tað ikki óhugsandi, at umleið eitt hálvt prosent av teimum fremmandu eru sek í krígsbrotsverkum.

# Samkynd kunnu giftast



*Mike Horgan og Ed Balmelli hava livað saman leingi. Nú ætla teir at giftast*

**Hægstirættur í amerikanska statinum Massachusetts hevur gjørt av, at myndugleikarnir hava ikki loyvi at banna samkyndum at ganga saman í hjúnarlag**

SAMKYND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Staturin kann ikki nokta tveimum av sama kyni at ganga saman í hjúnarlag, hava teir ella tær hug til tess, og rættindini og skyldurnar eru tær somu sum í øðrum hjúnarløgum.

Tað var niðurstøðan, sum hægstirættur í amerikanska statinum Massachusetts kom til fyrradagin. Samkynt hjúnarlag er annars ikki loyvt í USA, men í statinum Vermont hava myndugleikarnir eina lóg um avmarkað hjúnarlag, og sum í veruleikanum gevur samkyndum loyvi at giftast.

Sakførarin hjá teimum, sum høvdu lagt málið fyri hægstarætt, sigur, at úrskurðurin er ein stórur sigur fyri øll samkynd í USA.

Úrskurðurin hjá hægstarætti í Massachusetts ber í sær, at myndugleikarnir í statinum skulu broyta allar lógir, sum viðvíkja hjúnarlagi, og tað skal staturin gera innan seks mánaðir. Sjey samkynd pør hava boðað frá, at tey fara at giftast, so skjótt staturin hevur broytt lógirnar.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Daisy og John gullbrúdleyp



Fríggjadagin, 13. november, kundu hjúnini, Daisy og John Joensen í Havn, halda gullbrúdleyp.

Daisy er ættað úr Hvalba, dóttir Súsonnu Malenu, f. Pedersen og Viggo Niclasen.

John er ættaður úr Klaksvík, sonur Malvinu f. Steffensen og Jákup Joensen, sum vanliga varð róptur, sterki Jakku.

Daisy og John komu at kennast í Havn. Hon starvaðist í krambúðini hjá Katrinu Christiansen, og hann gekk á stýrismansskúla.

Tey bygdu sær hús á Gerðareiði í Klaksvík, men í 1961 fluttu tey til Havnar og bygdu sær hús á Frælsinum.

Tey eiga trý børn, Joan, sum býr í Klaksvík og Viggo og May, sum bæði búgva niðri. Ommu- og abbabørnini eru 10 í tali.

Tað, ið eyðkennir bæði Daisy og John, er teirra lætta og positiva lyndi. Kemur tú á gátt hjá teimum, stendur skjótt ein drekkamuður á borðinum.

Tey eru serstakliga vinsæl og gestablíð, og hjá teimum er altíð hugnaligt og reint, bæði úti og inni.

### 15 ára starvsdagur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi



Tann 1. november 1988 byrjaði hesin unglingin at starvast í køkinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hesi 15 árini Ingólvur Johannesen hevur starvast har, hevur hann m.a. flust eplir og grønmeti og pressa pappeskir eins og gingið til handar. Ingólvur er ein sera fryntligur maður og er sera nemmur at koma í prát við og veit altíð onkra góða søguna at fortelja.

Seinnapartar arbeiðir Ingólvur eisini sum móttøkumaður á Ruskplássinum hjá IRF, har kona hansara hjálpir honum. Saman syrgja tey fyri at alt rusk, sum kemur inn, verður sorterað, og at økið rundan um bingjurnar er reint og ruddiligt.

# Jákup Andreas í Snarskivuni

Hósdagin 23. november lat Jákup Andreas Arge, myndamaður, upp eina áhugaverda myndaframsýning í Snarskivuni í Havn.

Jákup Andreas má metast sum ein av pionérunum innan myndir og myndatøku í Føroyum.

Á framsýningini er 25 myndir, sum eru í glasi og rammu. Talan er m.a. um landslagsmyndir, sum eru tiknar úr tyrlu og persónsmyndir.

Jákup Andreas rekur eisini Føroya Myndasavn, sum m.a. gevur út kalendaran "Føroya Myndakalendari" , sum er komin út seinastu 25 árini.

Snarskivan er opin vanligar yrkadagar frá 9-16, men hósdag frá 9-18.

Framsýningin verður á Snarskivuni restina av hesum árinum



*Jákup Andreas Arge við áhugaverdu framsýning í Snarskivuni. Hendan myndin er av Líðar Dam í Húsavík, sum verður 90 ár fyrst í komandi ári*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hildigunnn og Mortan Johannesen:

# 25 ár síðan fyrri Enniberg bleiv keyptur

Týsdagin 18. november vóru liðin 25 ár síðan Hildigunn og Mortan Johannesen í Havn byrjaðu við síni egnu fyritøku og keyptu trolaran Sjúrðarberg, sum fekk navnið Enniberg.

Mortan hevði tá siglt sum skipari á trolaranum Skálaberg.

Fyrstu tíðina seldu tey fiskin gjøgnum Føroya Fiskasølu, men í 1986 stovnaðu tey sítt egna sølufelag, P/F Farcod.

Tá tey fingu nýggja Enniberg í 1990, bleiv tann gamli seldur til Grønlands, men seinni keyptu tey hann aftur, og hann fekk navnið Ljósafelli.

Í fyritøkuni eru trý partafeløg: P/F Enniberg, P/F Lósafelli og P/F Farcod

Mortan er er nevndarformaður og Hildigunn er stjóri í hesum partafeløgum.

Síðan 1997 hevur fyritøkan húsast í egnum bygningi á Argjum.

Umleið 90 fólk eru knýtt at fyritøkuni.



*Mortan og Hildigunn Johannsen við einum modelli av nýggja Enniberg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**20. november. Volkmarus.** Einki halgimenni ber hetta navnið, men navnið er komið í álmanakkarnar í 1730.